OVASTEVNA

# FÍNASTA VEÐRI





## OVADØTUR Á OVASTEVNU

*Tær báðar døturnar hjá Ova, Christina og Rose, eru í Nólsoy, nú ovastevna er. Sum nevnt er í Sosialinum fríggjadagin, er Sharlotte Rose Johenson í Føroyum á fyrsta sinni, nú ovastevna er. Saman við hálvsystir síni, Sylvia Christina Joensen, er hon í Føroyum, og tær báðar eru á fyrsta sinni saman á ovastevnu. Tær skulu báðar aftur av landinum aftur í morgin, so tær royna at njóta løtuna í kvøld saman. Myndin er tikin undir felagssanginum á Nýggjaveg, sum Himar Jan Hansen skipaði fyri*



## ÓKEYPIS HUMMARASUPPA

*Ovastevnunevndin bjóðaði ókeypis hummarasuppu í tjaldinum á keiini. Hummarasuppan var helst serliga ætlað regattafólkinum, men tað vóru ikki nógvir bátar, sum komu til Nólsoyar í dag. Hóast veðrið er at tí besta, eru bæði fáir bátar komnir, eins og fá fólk eru komin til Nólsoyar higartil í dag. Talið av regattabátum er beint oman fyri 10, og að mundu ikki vera fleiri enn um hundrað til framførsluna á keiini um lívið hjá Ova. Vónandi nýta fólk høvi at koma til Nólsoyar, tí nógv er at uppliva á ovastevnuni*



## FÓLK HUGNA SÆR

*Hóast ikki tað heilt stóra av fólki er komið til Nólsoyar higartil, so hugna tey, sum eru her úti, sær óført. Sjálvt um tað hevur regnað eitt sindur fyrrapartin, og onkur dropi eisini hevur verið seinnapartin, so er veðrið í Nólsoy ógvuliga gott. Og sambært nýggjastu veðurforsøgnunum verður turt og rímiliga stilt heilt fram til í hvussu er á miðnátt. Tá verður sagt frá einstøkum dropum, og lotið verður frískari. Alt er opið nú á ovastevnu, og klokkan 17 byrjaði kabarettin, Grind Propp, sum eisini erður sýnd klokkan 19. Klokkan 15 lótu Heimavirkið, barnaland, bátar í hyli, stevnukiosk og onnur tiltøk upp, og koyra nú á fult drøn. Og sum sagt, veðrið er av tí allarbesta í Nólsoy*



## FELAGSSANGUR OG SKEMT

*Tað er gott lív úti á Nýggjaveg í Nólsoy í løtuni, har felagssangur byrjaði klokkan 22. Í lítla pallltjaldinum, sum sett er upp á økinum, skipar Hilmar Jan Hansen fyri. Hann syngur fyri og spælir undir við guitara. Væl av fólki er møtt upp til felagssangin, ið er ein afturvendandi og vælumtóktur partur av ovastevnuni. Veðrið í Nólsoy er gott, nú felagssangurin sjungar. Fyrr í kvøld var eitt lítið æl, men nú er turt og milt og gott veður. Umframt, at Hilmar Jan Hansen syngur og spælir fyri til felagssangin, veit hann eisini nógvar góðar, sum hann "kryddar" løtuna við. Tað er ikki frítt, at mannamúgvan er í skellilátri millum mergjaðu sangirnar, ið verða sungnir úr sanghefti sum er gjørt til ovastevnuna. Nú eftir felagssangin er fýrverk á skránni á ovastevnu í Nólsoy*